# ein dyggan



*Javnaðarflokkurin stendur til at fáa ringasta valúrslitið síðani 1932, nú veljarakanning gevur flokkinum einans 13 prosent. - Rákið er borgarligt, sigur Jóannes Eidesgaard í viðmerking á næstu síðu*

# Sambandið aftur í front

**KANNING** At fara aftur í tíð hjá Sambandsflokkinum merkir, at flokkurin var størri. Tí er tað ein frægd hjá sambandsfólki at staðfesta, at flokkurin er á 1936-støði

Eirikur Lindenskov

Stórheitstíðin hjá Sambandsflokkinum var, tá føroysku politikkur einans snúði seg um ríkisrættarligu støðuna. Fram til 1928, tá Javnaðarflokkurin kom á ting, vórðu bara Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin umboðaðir á tingi. Vanliga var Sambandsflokkurin tann størri.

Hóast Sambandsflokkurin øll árini síðani hevur verið millum teir fýra stóru flokkarnar, so skulu vit leita heilt aftur til 1936 fyri at síggja ein Sambandsflokk, sum er eins stórur, og flokkurin nú er sambært veljarakanningini.

Pauli Ellefsen fekk flokkin aftur í front í sjeyti- og áttatiárunum - men so klárt í front, sum Kaj Leo Johannesen tykist vinna flokkin, tað hava vit ikki sæð síðani 1936.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Nú er ein stórur og nakrir smáir flokkar

**KANNING** Meðan vit í mannaminni hava havt fýra javnt stórar flokkar, so er hendan myndin við at kámast

Eirikur Lindenskov

Tað sum hevur eyðkent føroyskan politikk líka síðani 1954 er, at vit hava havt fýra javnt stórar flokkar. Teir hava upp á skift verið størstir, sum oftast Javnaðarflokkurin ella Sambandsflokkurin, onkuntíð Fólkaflokkurin, men ongantíð Tjóðveldisflokkurin fyrr enn á valinum í 1998.

Men nú er hendan myndin við at kámast. Nú hava vit ein sera stóran flokk - Sambandsflokkin, ein traditionelt stóran flokk, Tjóðveldisflokkin, og tveir millumstórar - ella kanska millum lítlar flokkar, Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin.

Teir smáu flokkarnir, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, halda sína støðu sum smáir marginalflokkar.

Polarisering hevur fyrr eyðkent valstríð, har Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin stríddust í sjeytiárunum, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin í áttatiárunum, og Sambandsflokkurin og Tjóðveldi í nítiárunum, tá stríð tók seg upp millum Føroyar og Danmark.

Men vit skulu heilt aftur til kríggið fyri at finna ein flokk, sum er so dominerandi, sum Sambandsflokkurin nú er sambært kanningini. Í 1945, tá Fólkaflokkurin toppaði, hevði hann 43,4 prosent av atkvøðunum.

Hetta kann vera tekin um broytingar í føroyskum politikki.

*eirikur@sosialurin.fo*

## Hvagar fara veljararnir frá valinum 2008? - Ella: Hvør letur til hvønn?

Atkvøddi á vali 2008 (rows) / Atkvøtt í dag (columns), %

| % | Fólkafl. | Samb.fl. | Javn.fl. | Sjálvst.fl. | Tjóðveldi | Miðfl. | Blankt | Ikki á val | Veit ikki | Tils. | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Fólkaflokkurin* | **49** | 11 | 1 | 3 | 4 | 1 | 15 | 1 | 15 | 100 | 74 |
| *Sambandsflokkurin* | 3 | **88** | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 7 | 100 | 68 |
| *Javnaðarflokkurin* | 2 | 13 | **52** | 2 | 4 | 2 | 10 | 4 | 11 | 100 | 83 |
| *Sjálvstýrisflokkurin* | 8 | 8 | 4 | **52** | 4 | 0 | 8 | 4 | 12 | 100 | 25 |
| *Tjóðveldi* | 1 | 1 | 0 | 1 | **75** | 0 | 6 | 1 | 15 | 100 | 109 |
| *Miðflokkurin* | 12 | 0 | 0 | 0 | 9 | **61** | 0 | 3 | 15 | 100 | 33 |
| *Miðnámsflokkurin* | 20 | 40 | 0 | 20 | 0 | 20 | 0 | 0 | 0 | 100 | 5 |
| *Blankt* | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 100 | 0 | 0 | 100 | 1 |
| *Var ikki á vali* | 0 | 6 | 0 | 6 | 6 | 6 | 11 | 28 | 39 | 100 | 18 |
| *Hevði ikki valrætt* | 8 | 0 | 17 | 8 | 25 | 8 | 0 | 8 | 25 | 100 | 12 |

| % | Løgtingsval | Veljarakanningar | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Fynd | Fynd | Fynd | Fynd | Gallup | Gallup | GDSM |
| | jan-08 | aug-08 | feb-09 | aug-09 | feb-10 | apr-10 | sep-10 | des-10 |
| *Fólkaflokkurin* | **20,1** | 23,4 | 18,6 | 19,8 | 18,8 | 21,0 | 17,8 | **16,4** |
| *Sambandsflokkurin* | **21,0** | 24,7 | 24,1 | 27,7 | 23,6 | 30,5 | 26,1 | **31,1** |
| *Javnaðarflokkurin* | **19,3** | 14,2 | 16,3 | 14,4 | 16,5 | 16,9 | 16,1 | **13,0** |
| *Sjálvstýrisflokkurin* | **7,2** | 7,1 | 7,3 | 6,9 | 6,9 | 2,5 | 5,1 | **7,2** |
| *Tjóðveldisflokkurin* | **23,3** | 23,1 | 24,7 | 23,1 | 24 | 23,9 | 26,8 | **24,6** |
| *Miðflokkurin* | **8,4** | 7,2 | 8,7 | 8,1 | 9,7 | 5,3 | 8,1 | **7,8** |
| *Miðnámsflokkurin* | **0,7** | 0,3 | 0,3 | 0,0 | 0,6 | - | - | **-** |
| *Tilsamans* | **100,0** | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,1 | 100,1 | 100,0 | **100,1** |
| *N=* | | 909 | 819 | 941 | 889 | 5-600 | ? | **434** |